

## Lá deyður í bátinum

Løgreglan í Keypmannahavn kannar nú umstøðurnar í sambandi við, at ein 25 ára gamal norðmaður varð funnin deyður í einum sokallaðum húsbáti í Suðurhavnini í Keypmannahavn týskvøldið. Tað er greitt, at maðurin var fyri ágangi á einum vertshúsi sunnumorgunin, tá onkur tveitti eitt tungt glas í høvdið á honum. Undir líkskoðanini bleiv staðfest, at maðurin var deyður av heilabløðing, og løgreglan sóknast nú eftir fólki, sum vóru á viðkomandi vertshúsi sunnumorgunin, og sum sóu, hvat hendi har.

# Ein vanlukka skal ikki henda á bátastevnu



**Sigling í báti er vorðið eitt frítíðarítriv, sum hevur vundið nógv upp á seg í Føroyum. Nógvar familjur duga soleiðis at hugna sær saman á báti. Tað er tí ógvuliga umráðandi, at øll, sum við eru til slík tiltøk, koma heimaftur í øllum góðum – og við ríkum upplivingum**

VESTMANNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Fyrireikingarnar til bátastevnuna í Vestmanna leygardagin eru so gott sum komnar undir land.

- Vit royna at gera umstøðurnar hjá teimum, sum koma í báti, so góðar sum til ber. Soleiðis hava vit aftur í ár lagt bátabrúgvarnar útaftur á sama hátt sum undanfarin ár. Hetta verður gjørt fyri at hava so góð atløguviðurskifti sum gjørligt. El-skáp verða eisini sett upp, soleiðis at bátar kunnu fáa el umborð. Hetta hevur stóran týdning fyri bátsmanningarnar, sum hava brúk fyri landstreymi, meðan stevnan er. Eisini verður okitil kampingvognar gjørt klárt við skipasmiðjuna, har hesir kunnu fáa bæði el og vatn.

Tað sigur Bárður Nielsen, sum er ein av trimum í bátastevnunevndini undir VÍF, Vestmanna Ítróttafelag.

### Trygd í hásæti

Hann sigur, at fyrireikararnir leggja stóran dent á, at trygdin hjá teimum, sum koma í báti og hjá fólki, sum ferðast eftir bryggjuni, verður sett í hásæti.

- Trygdarnet at spenna millum bátar og millum bátar og brúgvar verða til sølu, tá bátarnir koma til lands. Hetta eru net, sum vit hava fingið trolvirkið Vónina at gera, og sum skuldu verið væl egnaði til sítt endamál – nevniliga til fyribyrgjan, so fólk, ið ganga millum bátar og av báti og upp á brúgvar, ikki fara niður ímillum.

Bárður vísir á, at tey í ár eins og onnur ár eisini fara at skipa so fyri, at vaktarfólk verða á bryggjuni alla náttina.

- Hetta eru í fyrsta lagi fólk hjá sløkkiliðnum og bjargingarfelagnum í Vestmanna, umframt at vit plaga at hava sámarittar til at hjálpa okkum, meðan stevnan er, sigur hann.

### Skal ikki henda

Tað er meira enn so hent, at fólk eru farin niður ímillum á bátastevnum og øðrum stevnum kring landið, men tíbetur hevur onkur verið hjá, soleiðis at hesi eru fingin uppaftur á turt í øllum góðum – og áðrenn vanlukkan hendi.

- Ein slík vanlukka skal bara ikki henda, og vit fara sum nevnt at gera alt, sum liggur í okkara makt fyri, at umstøðurnar skulu vera so tryggar sum gjørligt.

Bárður vísir á, at skuldi tað ringasta hent, sum er ein druknivanlukka í sambandi við eina stevnu, hevði slík syndarlig hending lagt ein "dempara" á hesi tiltøk.

- Sigling í báti er vorðið eitt frítíðarítriv, sum hevur vundið nógv upp á seg í Føroyum, og tað eru nógvar familjur, sum duga at hugna sær saman á henda hátt. Tað er tí ógvuliga umráðandi, at øll, sum við eru til hesi tiltøk, koma heimaftur í øllum góðum – og við ríkum upplivingum.

### Vandamikið spæl

Bárður vísir á, at tá eitt nú ungdómur samlast er eisini skjótt, at fólk kunnu finna upp á býtt ting, sum eitt nú at leypa á sjógvin og svimja, kanska í kapping um eitthvørt hissini.

- Men eg vil staðiliga mæla frá, at nakar tekur sær slík óráð fyri, tí tað er ikki gamansleikur at leypa í kaldan sjógv, ikki minst, tá fólk eru í rúsi.

Bárður Nielsen sigur, at uppgávurnar hjá vaktunum, sum verða við bátabrúgvarnar alla náttina, í fyrsta lag eru at halda eyguni við, at eingin dettur á sjógv, men eisini at ansa eftir, at fólk í vandamiklum spæli ikki taka sær óráð fyri.

# Peningurin fer primert til kappróðrarneyst

**Neystið, sum kappróðrardeildin hjá VÍF hevur latið byggja, fer at standa í sløkum 2 miljónum krónum, tá tað er liðugt**

VESTMANNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Eitt úrslit av bátastevnuni í Vestmanna, sum nú verður hildin fyri áttandu ferð, er kappróðrarneystið hjá vestmenningum. Peningurin, sum kemur inn fyri bátastevnutiltakið, fer, sum Bárður Nielsen málber seg, primert til kappróðrarneystið.

- Vit tóku niðaru hædd í neystinum í nýtslu fyri nøkrum árum síðan, og nú er tað so ovara hæddin, sum skal innrættast og gerast liðug.

Bárður Nielsen, sum er í bátastevnunevndini hjá VÍF, sigur, at kappróðrarneystið er 22 x 12 metrar til støddar – og í tveimum hæddum, har ovara hæddin er líka stór í fermetrum sum hin niðara.

- Í niðaru hæddini hava vit bátarnar, skifti-og brúsurúm, wc'ir og venjingarhøli.

Hann sigur, at nú er tað ovara hæddin, sum stendur fyri at skula gerast liðug.

- Í ovaru hæddini verður eitt nú felagshøli og venjingarrúm.

Bárður vísir á, at higartil eru umleið 1,2 miljónir krónur lagdar í neystið og tað, sum eftir er at gera, fer helst at kosta einar 700.000 krónur, tá alt er liðugt.

- Soleiðis fer kappróðrarneystið, tá báðar hæddirnar standa lidnar, at kosta slakar 2 miljónir krónur, leggur hann aftrat.